## Dystaryvirlit:

**Leygardagin 15. august klokkan 15.00:**

| | |
|---|---|
| B36-AB | Dagfinn Olsen |

**Sunnudagin 16. august klokkan 15.00:**

| | |
|---|---|
| EB/Streymur-07 Vestur | Rúni Gaardbo |
| Víkingur-ÍF | Georg Rasmussen |
| HB-B68 | Lars Müller |

**Klokkan 17.00**

| | |
|---|---|
| NSÍ-KÍ | Ransin Djurhuus |

## Máltindurin

**Vodafone-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| Finnur Justinussen | Víkingur | 14 |
| Ahmed Keita | B68 | 11 |
| Andrew av Fløtum | HB | 11 |
| Karoly Potemkin | NSÍ | 11 |
| Jens Erik Rasmussen | 07 Vestur | 10 |
| Arnbjørn Hansen | EB/S | 8 |
| Fróði Benjaminsen | HB | 7 |
| Rógvi Poulsen | HB | 7 |
| Tór-Ingar Akselsen | 07 Vestur | 6 |
| Jóan Símun Edmundsson | B68 | 6 |
| Bjarni Jørgensen | HB | 6 |
| Milan Kuljic | HB | 6 |
| Andy Olsen | ÍF | 6 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 6 |
| Kristoffur Jacobsen | KÍ | 6 |
| Bogi Løkin | NSÍ | 6 |

*Toppskjúttin í Vodafone-deildini fær eftir kappingarárið handað gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti*

NSÍ 5

HB – B68:

# Sterkt álop móti veikari verju



*Hans á Lag veit ikki, hvør kemur at standa undir hansara lið sunnudagin*

**Vagnur Mohr Mortensen er skaddur og Rasmus Nolsøe er farin av landinum. Tað kemur illa við hjá HB, nú mótstøðumenninir eita Keita og Jóan Símun Edmundsson**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Vagnur Mohr Mortensen er framvegis ikki tøkur hjá HB, og Rasmus Nolsøe er farin av landinum í útbúgvingarørindum. Tað merkir, at miðverjan hjá HB er alt annað enn sterk, nú Keita við 11 málum og landsliðsleikarin Jóan Símun Edmundsson eru teir, sum skulu ansast.

HB er helst einasta liðið, sum hevur ráð at missa stig í løtuni. Teir hava sjey stig niður til Víking, men vilja sjálvsagt halda fast við hetta forspring. Tí arbeiðir HB í løtuni við at fáa Rasmus Nolsøe heim úr Danmark.

### Eisini veik verja á Toftum

Eisini toftamenn mangla í verjupartinum. Jóhan Dávur Højgaard er leikbannaður. Maðurin, sum hevur spælt á hansara plássi onkuntíð fyrr, Niklas Joensen, hevur ein vøddaskaða, so honum rokna tey ikki við á Toftum.

Eisini tykist tað vera ógvuliga ivasamt, hvussu verður við veteraninum Øssur Hansen. Hann hevur ikki vant í vikuni, men í gjárkvøldið joggaði hann eina løtu á vøllinum.

Við øðrum orðum verður talan um tvær verjur, sum eru viknaðar, nú oddabrak verður í Gundadali sunnudagin.

B68 skal aftur á beint, eftir at teir taptu fyri fyrstu ferð í 13 dystir, meðan HB skal halda sína góðu gongd, har teir hava verið ósigraðir í 15 dystir á rað.

B36 – AB:

# Trý stig fyri triðju ferð

**AB vil hava trý stig fyri triðju ferð á rað, meðan B36 – við nýggjum venjara aftrat Mikkjal Thomassen – stríðist fyri at sleppa leyst av niðurflytingarmarkinum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Sigfríður Clementsen er maðurin, sum saman við Mikkjali Thomassen, skal hála B36 upp eftir stigatalvuni. Maðurin, sum framvegis er løntur av EB/Streymi, hevur áður gjørt B36 til meistarar, kennir Mikkjal Thomassen ógvuliga væl, og bæði í EB/Streymi og í B36 var Mikkjal Thomassen ein av leikarunum hjá Sigfríða Clementsen. Í so máta er ikki talan um nakað nýtt samstarv teirra millum.

Saman skulu teir gera tað, Mikkjal Thomassen ikki megnaði at fáa liðið til í nóg stóran mun.

Kappingarárið byrjaði annars so væl við trimum sigrum á rað, men 20. juni var seinast B36 fekk trý stig.

Hesum fara teir sjálvsagt eftir í morgin – B36 og AB spæla leygardagin klokkan 15.00 – og eru teir rímiliga væl fyri. Bæði Jóhan Ellingsgaard og Dennis Holmberg, sum hava havt trupulleikar av ávíkavist einum trælæri og einum vøddaskaða, verða eftir øllum at døma tøkir í morgin. Hinvegin er ivasamt hvussu verður við Ásbjørn V. Gunnarsson, sum hevur ein minni skaða at dragast við.

### Fult fyri triðju ferð

Á Argjum hevur tað hepnast serstakliga væl teir báðar síðstu dystirnar. Fyrst settu teir meistararnar upp á pláss og vunnu 0-3, og síðani gjørdu teir aftur trý mál í móti NSÍ, meðan teir lótu eitt ígjøgnum.

Nú fara teir eftir – um ikki trimum málum – so í øllum førum trimum stigum, tá teir vitja í Gundadali. Í hesi roynd mugu argjamenn framvegis síggja burtur frá Heðin Stenberg og Jónas Stenberg, sum eru langtíðar skaddir, umframt at Høgni Joensen eisini hevur ein skaða og John Hansen framvegis er burturstaddur í lestrarørindum. Síðstnevndi verður væntandi aftur til næsta dystin hjá AB.